## Ræst í Reykjavík

Leygarkvøldið 24. februar skipar Føroyingafelagið í Reykjavík fyri veitslu, og hóast tað sambært íslendskari lóg er forboðið at innflyta ræst kjøt til landið, verður kjøtið á borðinum leygarkvøldið kortini ræst, men tað er ræsað í Íslandi. Felagið hevur fingið tann kenda tíðindamannin og politikaran Árna Johnsen úr Vestmannaoyggjunum at vera veitslustjóra. Aftan á borðhaldið verður dansur. Føroyingafelagið í Reykjavík varð stovnað í 1943.

## Ferð á í Grønlandi

Grønlendingar læna pengar sum ongantíð fyrr til hús, bilar og bátar, og tað sæst aftur í roknskapinum hjá Grønlandsbankanum fyri árið í fjør, sum varð almannakunngjørdur í gjár. Raksturin gav 67 mió. krónur í avlopi eftir skatt. Tað var 11 mió. krónur meiri enn í 2005 og besta úrslitið hjá bankanum, síðani hann varð stovnaður fyri skjótt 40 árum síðani. Roknskapurin vísir týðiligan vøkstur bæði á tí privata og á tí vinnuliga økinum, sigur KNR.

# Rednex uttan Mary Joe

**Fleiri av teimum, ið vóru farin á konsertirnar hjá Rednex í Fuglafirði og REX fríggjakvøldið fóru skuffaði til hús, tí bólkurin hevði ikki karismatisku Mary Joe við sær til Føroyar**

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Svenska songkvinnan gjørdist í vikuni somikið sjúk av streptokokkum, at bólkurin hóskvøldið ringdi til føroysku fyrireikararnar og við boðum um, at Mary Joe meldaði avboð.

– Vit fingu tríggjar møguleikar at velja ímillum. Vit kundu avlýsa, at tey komu og spældu play-back ella, at hinir limirnir komu og sungu live. Hetta bar væl til, tí Mary Joe einans spælir ein stóran leiklut í tí eina kenda lagnum, Wish You Were Here, sigur Rúni Djurhuus frá byin.fo.

Rúni greiðir frá, at teir vóru greiðir yvir, at tað ikki bar til at bjóða føroyingum play-back, so tí var loysnin við hinum limunum vald, hetta fyri ikki at avlýsa tiltøkini.

– Vit høvdu fingið í lag, at ein góð føroysk songkvinnan skuldi vera við sum avloysari á Wish You Were Here, og inntil um 19 tíðina fríggjakvøldið var hetta ætlanin. Men tá avgjørdi Mary Joe, at hon ikki vildi hava, at nøkur onnur songkvinna luttók í hennara stað, greiður Rúni Djurhuus frá.

Men átti fólk ikki at fingið boðini, tá byin.fo visti um hetta longu hósdagin?

Rúni viðgongur, at tað tey kundu havt kunnað um hetta, men at av tí, at tey arbeiddu við eini aðrari loysn, var trupult at vita, hvat tey skuldu kunna um. Hann sigur tó, , at tað ikki ber til at broyta tað, ið er gjørt ella ikki gjørt. Men vísir á, at tey flestu hugnaðu sær alíkavæl.

– Onkur vildi hava pengingin aftur, og onkri fingu tað, sigur Rúni Djurhuus.




*Virðislønta songkvinnan Mary Joe var ikki við, tá Rednex vitjaðu í Føroyum fríggjakvøldið*

*Mynd: Scanpix.dk*




# AME fer aftur til Íslands

**Tá Atlantic Music Event aftur vitjar í Reykjavík 31. mars, verður tað við nøkrum av okkara fremstu tónleikanøvnum, luttakarar verða Eivør, Teitur, Gestir, Høgni Lisberg og Brandur Enni**

TÍÐINDASKRIV




*Høgni Lisberg spælir aftur í ár á AME Reykjavík, í fjør fekk Høgni gjøgnumbrot í Íslandi í sambandi við luttøkuna*

*mynd: nud*

Høvuðsfyriskiparar av AME Reykjavík eru Menningarstovan, Norðurlandahúsið og TUTL.

Høvuðskonsertin verður kenda á spælistaðnum NASA í Reykjavík, leygarkvøldið 31. mars 2007. Vónandi fara tónleikarnir eisini at spæla aðrar konsertir í Reykjavík, eitt nú var skipa fyri smærri hugnaligum konsertum á Grandrock til AME í Reykjavík 2006. Møguleiki er eisini fyri onkrari konsert í øðrum hølum, meira verður at frætta um hetta seinni, siga fyrireikararnir.

Fyrireikarnir vænta hópin av gestum at til konsertina og eisini at íslendskir fjølmiðlar og onnur innnan tónlistavinnuna fara at koma til AME í Reykjavík. Í fjør vóru bæði skrivandi og sjónvarp til tiltakið.

AME tiltakið í 2006 hevur havt við sær størri fokus á føroyskan tónleik í Íslandi, tí nú verður meira av nýggjari føroyskum tónleiki spældur í íslendskum útvarpi, m.a. tey sum luttóku í fjør.

– Fyri at økja enn meira um áhugan hava vit valt at blanda konsertina við bæði kendum og minni kendum føroyskum nøvnum í Íslandi. Hesi eru Teitur við strúkarum, Eivør Pállsdóttir við bólki, Gestir við strúkarum, Brandur Enni duo og Høgna Lisberg við bólki, verður sagt úr Norðurlandahúsinum.

Ætlanin var at Brandur skuldi luttaka í 2006, men tá var nýggja tilfarið hjá Brandi ikki klárt. Men nú er Brandur klárur at trína á íslendska tónlistapallin við nýggjum tilfarið.

RÁS 2 í Íslandi hevur gjørt av at taka upp konsertina og senda hana á páskum 2007.

Høvuðsstuðlar eru Menningarstovaan við stuðli frá Vinnuframagrunnurin, Norðurlandahúsið í Føroyum og Altantic Airways. Aðrir stuðlar eru m.o. Jákup Jakobsen, Sjómansheimið Ørkin og íslendska bryggjaríið Vífilfell.